Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 04.11. 2025
Mál nr.: 22/13718
Málsviðgjørt: TM, BAB, JS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 1. [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* Persónur, ið fær eftirlønarútgjald sambært hesi løgtingslóg skal ikki framhaldandi spara saman til egna eftirløn av løn, ið hann forvinnur. *Stk. 5.* Persónur, ið flytur til Føroya í sambandi við eitt tíðaravmarkað starv, kann søkja TAKS um at vera frítikin fyri at rinda til eina føroyska eftirlønarskipan sbrt. hesi løgtingslóg. Undantak kann verða givið í eitt ella fleiri tíðarskeið, tó í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur. *Stk. 6.* (Strikað). *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* Persónur, ið er fevndur av hesari løgtingslóg, og sum ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu í sambandi við starvsetan, ella í sambandi við, at hann móttekur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av. *Stk. 9.* (Strikað).	**§ 1.** [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* Persónur, ið fær eftirlønarútgjald sambært hesi løgtingslóg kann ikki framhaldandi spara saman til egna eftirløn av løn, ið hann forvinnur. *Stk. 5.* Eftirlønarsamansparing hjá persóni, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur. *Stk. 6.* Persónur, sum eina ferð hevur fingið eftirlønina útgoldna sbrt. stk. 5 og kemur aftur til Føroyar at arbeiða, kann tó ikki fáa eftirlønina útgoldna fyrr enn 10 ár aftaná at persónurin er fluttur av landinum aftur. *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* Persónur, ið er fevndur av hesari løgtingslóg, og sum ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu í sambandi við starvsetan, ella í sambandi við, at hann

	móttekur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av. Hevur persónur ikki stovnað eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av, kann TAKS vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara sbrt. § 5, stk. 1. og flyta eftirlønarsamansparing, ið stendur á depotkonto hjá TAKS sbrt. § 16 a, til eftirlønarkonto hjá persóninum. *Stk. 9.* (Strikað).
§ 2. [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* Av tí í stk. 1 ásetta minsta eftirlønargjaldi, kann í mesta lagi ein triðingur árliga fara til persónstryggingar, restin skal fara til eftirlønarsamansparing. Tað er eftirlønarveitari, ið skal tryggja, at árliga hámarkið verður fylgt. *Stk. 9.* Tað í stk. 1 álagda eftirlønargjaldið verður lækkað í tann mun, eftirlønarsamansparari á sína eftirlønarkontu fær goldið gjaldsundantøkutrygging. Í sambandi við útrokning av lækking verða inngjøld frá gjaldsundantøkutrygging bruttofiserað sbrt. skattaprosentinum í § 12, stk. 2. *Stk. 10.* Eftirlønargjald sbrt. stk 1 og 5, ið er minni enn 30 krónur, verður ikki álagt at rinda. § 2, stk. 8 Galdandi orðingar	**§ 2.** [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* Av tí í stk. 1 ásetta minsta eftirlønargjaldi eftir skatt, kann í mesta lagi ein triðingur árliga fara til persónstryggingar, restin skal fara til eftirlønarsamansparing. Tað er eftirlønarveitari, ið skal tryggja, at árliga hámarkið verður fylgt. *Stk. 9.* [...] *Stk. 10.* Er eftirlønargjaldið av A-inntøku minni enn 30 krónur, verður tað ikki álagt at rinda sbrt. hesi løgtingslóg. Er eftirlønargjaldið av B-inntøku minni enn 500 krónur, verður tað ikki álagt at rinda sbrt. hesi løgtingslóg. *Stk. 11.* Skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr.
§ 3. Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður ikki rindað av niðanfyri nevndu peningaupphæddum: 1) Vinningi av eydnuspæli, legati, sømdargávu og líknandi. 2) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 3) Uppihaldspeningi sambært hjúnabandslóggávuni. 4) Útgjaldi sambært løgtingslóg um ættleiðingarstuðul. 5) Útgjaldi sambært løgtingslóg um lestrarstuðul.	**§ 3.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður ikki rindað av niðanfyri nevndu peningaupphæddum: 1) Vinningi av eydnuspæli, legati, sømdargávu og líknandi. 2) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 3) Uppihaldspeningi sambært hjúnabandslóggávuni. 4) Útgjaldi sambært løgtingslóg um ættleiðingarstuðul. 5) Útgjaldi sambært løgtingslóg um lestrarstuðul.

6) Útgjaldi av tryggingarupphædd og líknandi. 7) Útgjaldi sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir. 8) Útgjaldi av lutaeftirløn. 9) Útgjaldi av lívrentu og líknandi. 10) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, tó undantikið útgjaldi sambært §§ 12, 14, 22 og 25. 11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. 12) Útgjaldi sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. 13) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. 14) Útgjaldi sambært forsorgarlógini, tó undantikið útgjald sambært § 9, stk. 2, § 13 og § 17, stk. 3. 15) Útgjaldi sambært løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening. 16) Útgjaldi sambært kunngerð um samsýning til fosturforeldur, tó undantikið útgjald sambært § 1, stk. 1. 17) Inntøka forvunnin í Grønlandi, sum tvungin eftirløn skal rindast av sbrt. Inatsisartutlov nr. 21 af 28. november 2016 om obligatorisk pensionsordning. 18) Inntøka frá arbeiði fyri arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, um løntakarin antin rindar til NAV ella hevur eina eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands.	6) Útgjaldi av tryggingarupphædd og líknandi. 7) Útgjaldi sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir. 8) Útgjaldi av lutaeftirløn. 9) Útgjaldi av lívrentu og líknandi. 10) Útgjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, tó undantikið útgjaldi sambært §§ 12, 13a, 14, 22 og 25. 11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar. 12) Útgjaldi sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. 13) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. 14) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, tó undantikið útgjald sambært § 12, § 13 og § 25. 15) Útgjaldi sambært kunngerð um samsýning til fosturforeldur, tó undantikið útgjald sambært § 1, stk. 1. 16) Inntøka forvunnin í Grønlandi, sum tvungin eftirløn skal rindast av sbrt. Inatsisartutlov nr. 21 af 28. november 2016 om obligatorisk pensionsordning. 17) Inntøka frá arbeiði fyri arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, um løntakarin annaðhvørt rindar til NAV ella hevur eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi, og har inngjaldið annaðhvørt einsæris ella saman við inngjaldi í Føroyum er á sama støði sum kravt í § 2, stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands.
§ 9. Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu. *Stk. 2.* Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Boðast skal frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn, útgjald byrjar. Í fráboðanini til	**§ 9.** Útgjald av eftirlønarsamansparing, við undantaki av stk. 5 og 9, byrjar fyrsta mánaðin eftir, at eftirlønarsamansparari røkkur fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu. *Stk. 2.* Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Boðast skal frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn, útgjald byrjar. Í fráboðanini til TAKS verður upplýst, hvussu og nær

TAKS verður ásett, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast. Býtið verður roknað av samansparda virðinum útgjaldsdagin og skal, undantikið stk. 4, stk. 5 og § 10, stk. 2, uppfylla hesar treytir: 1) Í minsta lagi 45% skal verða útgoldið sum lívslong veiting, lívrenta, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann, sum eigur og hevur stovnað tryggingina, er á lívi, men sum fellur burtur, tá ið viðkomandi doyr. 2) Í mesta lagi 55% kann verða útgoldið sum lutaeftirløn, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, ið verður útgoldin yvir eitt avtalað tíðarskeið, tó í minsta lagi 10 ár. 3) Í mesta lagi 15% kann útgjaldast sum kapitalútgjald, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein upphædd, sum verður útgoldin í einum. *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* [...] *Stk. 9.* [...]	samansparda eftirlønin skal gjaldast út, undir hesum peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. Býtið verður roknað av samansparda virðinum útgjaldsdagin og skal, undantikið stk. 4, stk. 5 og § 10, stk. 2, uppfylla hesar treytir: 1) Í minsta lagi 45% skal verða útgoldið sum lívslong veiting, lívrenta, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann, sum eigur og hevur stovnað tryggingina, er á lívi, men sum fellur burtur, tá ið viðkomandi doyr. 2) Í mesta lagi 55% kann verða útgoldið sum lutaeftirløn, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein eftirlønarskipan, ið verður útgoldin yvir eitt avtalað tíðarskeið, tó í minsta lagi 10 ár. 3) Í mesta lagi 15% kann útgjaldast sum kapitalútgjald, ið sbrt. hesari løgtingslóg er ein upphædd, sum verður útgoldin í einum. *Stk. 3.* [...] *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* [...] *Stk. 9.* [...] *Stk. 10.* Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn, útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til. *Stk. 11.* Eru neyðugu upplýsingarnir um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnir eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, sum eftirlønarveitari kann stovna til eftirlønarsamanspararan, og sum ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnir eftirlønarveitara, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt afturat Vanganum.

	Stk. 12. Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11.
§ 10. [...] *Stk. 2.* [...]	**§ 10.** [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* Flyting áðrenn útgjaldsdagin frá eini eftirlønarsamansparing til eina aðra verandi ella nýggja eftirlønarsamansparing her í landinum hjá sama persóni verður ikki viðgjørd sum útgjalding ella inngjalding. Landsstýrisfólkið ásetir í kunngerð nærri reglur.
§ 12. [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* Tað er frádráttarrættur ávikavist burtursíggingarrættur í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjøld eftir hesi løgtingslóg til eftirlønarsamansparing og til persónstryggingar. Sami skattligi frádráttarrættur er fyri sjálvboðið inngjald sbrt. § 2, stk. 3, og fyri inngjald sbrt. § 1, stk. 6 og § 17, stk. 1 og 5. *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* [...] *Stk. 9.* [...] *Stk. 10.* [...]	**§ 12.** [...] *Stk. 2.* [...] *Stk. 3.* Tað er frádráttarrættur ávikavist burtursíggingarrættur í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjøld eftir hesi løgtingslóg til eftirlønarsamansparing og til persónstryggingar. Sami skattligi frádráttarrættur er fyri sjálvboðið inngjald sbrt. § 2, stk. 3, og fyri inngjald sbrt. § 17, stk. 1 og 5. *Stk. 4.* [...] *Stk. 5.* [...] *Stk. 6.* [...] *Stk. 7.* [...] *Stk. 8.* [...] *Stk. 9.* [...] *Stk. 10.* [...]